tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 166 Fríggjadagur 1. september 1995 69. árgangur Krónur 7,00

»Hjartamál« fyri hópin av føroyingum:

## Vit fáa tveir eygnalæknar

**Í dag byrjar nýggjur yvirlækni á eygnadeildini á Landssjúkrahúsinum, soleiðis at teir hereftir verða tveir eygnalæknar. Kári Holm hevur røkt arbeiðið einsamallur í 18 ár**

Síða 4



Nýggi eygnalæknin eitur Kaj Vilhelmsen, her saman við Kára Holm, eygnalækna

Mynd kalmar

## Russlandsdysturin ikki í SvF

*Einki røkist fyri, at FSF og SvF koma hvørjum øðrum nærri, tá talan er um at senda landsdystir beinleiðis í sjónvarpi*

## Ungdómshagtølini við í dag

*Úrslit, støður og málskjúttar hjá dreingjum og unglingum*

## KÍ fekk luft

Ítróttur á síðu 17, 18 & 19



## Føroyingar í Íslandi vilja sleppa heim



**Teirra millum er Símin Hansen í Reykjavík, sum saman við øðrum bíðar eftir, at umstøðurnar í Føroyum verða frægari**

Síða 3

## Danir áhuga fyri Lopraholi

**Peningaliga er tað ikki ein ómøgulig uppgáva hjá DONG saman við føroyingum at hyggja nærri at boriholinum í Lopra, sigur Holger Lavesen, stjóri**

Síða 10

*Stjórin í donsku milliardafyritøkuni DONG:*

# Stóran áhuga fyri Lopraholinum

*Tit eiga eina sera professionella oljuumsiting, sum bæði føroyingar og útlendsk feløg kunnu kenna seg trygg við sigur stjórin í DONG, Holger Lavesen, sum vísir stóran áhuga fyri Lopraholinum. Har kann helst borast fyri rímuligan pengar*



*Enn er borikranin í Lopra spælipláss hjá børnunum. Skjótt verður hetta sama plássið møguliga ein týðandi partur í leitingini eftir olju og gassi. Mynd jan*

– Føroyska oljufyrisitingin er sera professionell og ger eitt framúr gott arbeiði, tá hugsað verður um, hvussu avmarkaðar ressursir hesin stovnurin hevur. Tí siggja vit eisini fram móti einum góðum og vónandi drúgvum samarbeiði millum DONG øðrumegin og føroysku oljufyrisitingina og fyri tað føroyskar myndugleikar hinumegin.

Hetta positiva skoðsmálið hevur øvasti stjórin í stóru donsku oljufyritøkuni DONG, Holger Lavesen.

Hann luttekur í hesum døgum á ráðstevnu í Føroyum saman við umleið 30 leiðarum úr øllum DONG-samtakinum.

Samtakið, sum er alment partafelag, hevur ein umsetning upp á 7 milliardir krónur.

Fyritøkan arbeiðir fyri tað mesta í Norðsjónum men er nú eisini farin at vísa føroyska økinum ans.

**Føroyingar greiddu frá**

Í gjár høvdu tey 30 DONG-fólkini høvi til at hoyra, hvat Martin Heinesen, leiðari á oljufyrisitingini og Árni Ólafsson, formaður í Oljuráðleggingarnevndini og nevndini, sum samráðist um markið, hava at siga um gongdina á oljuøkinum og í marknaðsemjuni við bretar.

Stjórin í DONG samtakinum, sum áður hevur verið í Føroyum, heldur, at bæði føroyingar og útlendsk oljufeløg kunnu kenna seg trygg við arbeiðið og ta tænastu, sum føroyska oljufyrisitingin kann veita.

Uppá fyrispurning um DONG ella okkurt av døtturfeløgunum, eitt nú DOPAS, eru hugað at gera íløgur í Føroyum í næstu framtíð, sigur Holger Lavesen, at tað er ov tíðliga at siga nakað ítøkiligt um tað nú.

Men hann viðgongur, at DONG hevur stóran áhuga fyri føroyska økinum, ikki minst eftir at jarðfrøðingar hjá fyritøkuni hava havt høvi at siggja nakað av tí seismiska tilfarinum frá føroyaøkinum, sum samstarvspartnarin Amerda Hess hevur tulkað.

Við Sosialin í gjár segði Holger Lavesen, at hann metir møguleikarnar at finna olju við Føroyar at vera góðar.

**Møguliga at bora í Lopra**

Holger Lavesen sigur víðari, at teir hava tosað við oljufyrisitingina um fleiri mál og her kanska serliga um møguleikan at gera okkurt í sambandi við Lopraholið.

DONG vísir Lopraholinum stóran ans.

– Tað vil vera ein fíggjarliga møgulig uppgáva at fara undir at bora aftur við Lopra.

Vit eru hugaðir at hyggja uppá Lopraholið aftur saman við føroysku undirgrundarfyrisitingini.

Spurningurin er um holið skal gerast djúpri ella okkurt annað skal gerast. Tað eru hetta vit eru í ferð við at tosa við oljufyrisitingina um. Men enn er eingin avgerð tikin sigur Holger Lavesen.

jan



*Árni Ólafson greiðir dønum frá marknaðsemjuni. mynd kalmar*



*Umleið 30 fólk frá DONG halda skeið í á Hotel Føroyum í hesum døgum. Mynd kalmar*


**Heystdansur**

í Gundadalshøllini

Leygardagin 2. september 1995 kl. 22




WEST-RIVER-RECORDING

**Frelsunarherurin Tórshavn**

Samlingssunnudagur 3. september.

Kl. 11.00: Morgunmøti og Sunnudagsskúli.
Kl. 17.30: Bøn.
Kl. 18.00: Møti

*Øll eru hjartaliga vælkomin!*

**Veðurtænastan á Veðurstøðini**

Upplýsingar um veðrið á veðurstøðunum kunnu fáast við at ringja á tlf. 12210.